# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Amager á føroyskar hendur

**Fremad Amager í donsku 1. deild fær eftir øllum at døma føroyskan eigara. Tað er sannlíkt, at Todi Jónsson saman við øðrum skal keypa partabrøvini í felagnum, har hann møguliga eisini skal spæla. Sjálvur vil Todi als ikki gera viðmerkingar til tosið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Danska Fremad Amager hevur í morgun kallað inn til eykaaðalfund. Tað hevur í eina tíð ljóðað, at Todi Jónsson saman við øðrum íleggjarum hevur roynt at keypt seg inn í felagið, og dagsskráin til fundin váttar, at nakað er um tosið. Tey bæði málini, sum standa á skránni, eru í fyrsta lagi ein kapitallækkan og í øðrum lagi kapitalhækkan.




*Nógv bendir á, at Fremad Amager fær føroyskar eigarar. Todi Jónsson saman við øðrum tykist vera ávegis at keypa felagið*

### Kapitalur og spælari

Tað í sjálvum sær ger nú ikki Toda Jónsson til eigara av felagnum, men aðrir lutir undirbyggja eisini sannlíkindini fyri tíðindunum.

Føroyski áleyparin hevur enn til góðar at finna sær nýtt felag, og sjálvur hevur hann alla tíðina sagt, at hann avgjørt roknar við at halda fram við fótbóltinum. Og at hetta verður í einum felag í donsku 1. deild í høvuðsstaðarøkinum.

Útmeldingarnar frá Fremad Amager kring ársskiftið vóru sum so eisini greiðar:

»Nevndin metir tað vera neyðugt at styrkja um kapitalgrundarlagið. Eisini so spælarahópurin kann styrkjast. Ein røð av positivum forhandlingum hava verið við møguligar íleggjarar, og vit rokna við, at ein hækkan av partapeninginum verður framd, áðrenn februar mánaður er runnin.

Samstundis ætla vit at almannakunngera navnið á einum topp-spælara, sum fer at at styrkja spælarahópin, áðrenn seinna helvt av kappingarárinum byrjar.«

### Vindeygað er stongt

Tá tosað verður um, at felagið skal fáa tilgongd av einum toppspælara, eru møguleikarnir ógvuliga avmarkaðir. Danska transfer vindeygað er nevnliga stongt, og tí er neyðugt, at talan er um spælara, sum ikki er knýttur at nøkrum felag. Tær treytirnar lýkur Todi, sum altso ætlar at halda fram við fótbóltinum.

Sosialurin hevur tosað við Toda Jónsson, men hann vil als ikki gera viðmerkingar til tíðindini.

## Arbeiðarafelag í Sundby

**Fremad Amager er av sonnum ein partur av donsku fótbóltsmentanini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Felagið, sum eftir øllum at døma fær føroyskar eigarar innan alt ov langa tíð, hevur ikki sveimað heilt so nær toppinum av donskum fótbólti seinnu árini. Fyrst og fremst, tí felagið ikki var eitt av teimum, sum av álvara megnaði at fylgja við, tá pengafótbólturin fór at gera um seg í Danmark.

Við djúpum rótfesti í arbeiðararørsluni var pengafótbóltur heldur ikki tann vegurin, sum var mest náttúrligur at fara, og tí hevur felagið livað eina rættiliga friðarliga tilveru seinnu árini. Størsta fokusið hevur tí helst verið frá »Smeden«, sum er eitt av heldur skemtiligu ískoytunum hjá danska Tipsblaðnum. Vinurin hjá Tavse Tipper Thomsen fylgir væl við, og kenslur hansara eftir tap ella sigur hjá felagnum á Amager verða aloftast listarliga lýstar í førstu klummuni.

Og hartil hevur felagið eisini fingið nakað av umrøðu í Føroyum. Tríggir føroyskir landsliðsspælarar hava seinnu árini gjørt um seg í felagnum. Andrew av Fløtum hevur verið at kalla fastur fúsur í álopinum hesa tíðina, men hartil hava Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør eisini royntseg í Sundby Idrætspark, har felagið spælir sínar heimadystir.

# Sylla rýmir frá B36

**Sylla verður ikki at síggja í B36-búnanum komandi kappingarár. Tað váttar Kristjan á Neystabø, sum viðgongur, at tað kemur dátt við hjá teimum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Kristjan á Neystabø, stjóri í FC Tórshavn, segði við Dimmalætting í gjár, at Sylla kemur ikki aftur til Føroya. Tað var frýggjakvøldið fyri hálvari aðru viku síðani, at hetta bleiv staðfest. Orsøkirnar aftanfyri hesa avgerð eru persónligar. Unnustan hjá Sylla var í fjør í Fraklandi, og vildi helst sleppa undan at koma til Føroya. Tí vistu tey í B36 av, at vandin fyri at missa spælaran var til staðar. Og tí fekk hann eisini lyfti um, at felagið ikki vildi forða honum, um hann fekk sáttmála við útlendskt felag.

- Fyri okkara viðkomandi er tað sjálvandi ein missur, men vit havaframvegis ein góðan hóp at arbeiða við, sigur Kristjan á Neystabø við Dimmalætting.

Eftir farna kappingarár hevur B36 eisini sagt farvæl við Óbi, sum er farin til Skála at spæla. Hinvegin hava teir fingið bæði Allan Mørkøre, Ova Nysted og Helga L. Petersen, sum allir kunnu røkja álopsplássini.

Afturat hesum kemur møguliga ein brasiliumaður at kappast við teir. Hesin vandi fyri fyrstu ferð saman við hópinum í gjár, og í miðvikuni skal hann ætlandi vera við í venjingardysti móti HB.